# Hvør verður Ársins Virki?

**Nú Vinnudagurin 2008 verður í morgin, og Ársins Virki 2008 verður avdúkað, hava vit sett seks framstandandi vinnulívsfólkum tveir spurningar. Vit hava spurt tey, hvat virki tey halda er ein góður kandidatur til at gerast Ársins Virki, og hvat tey halda eigur at vera fremsti boðskapurin til vinnulívsfólk og vinnuna í Føroyum.**

## Johannes Jensen,

### stjóri Hotel Føroyar



P/F Vinnan ella P/F Christian í Grótin. Fíggjarligu úrslitini hava verið góð, og so tað, at teir hava tora at gjørt sera stórar íløgur eftir føroyskum mátistokki, sum kunnu geva gott úrslit, men sum eisini kunnu geva stórt hall. Tær íløgurnar hava lønt seg væl higartil. Og so eisini tað at teir arbeiða internationalt, millum annað við at teir byggja eitt skip í hinum endanum á jørðini.

Fremsti boðskapurin má verða at fáa ein størri flogvøll og kapping á økinum. Tað er tað vigtigasta at fáa loyst.

## Marner Jacobsen,

### stjóri í Føroya Sparikassa



- Bakkafrost, Tavan ella Luna– Teir hava verið dugnaligir, og hava gjørt tað gott í ár.

Umráðandi at trúgva uppá at vit vinna okkum kappingarførið aftur, og ikki missa mótið. Hóast nógv skýggj eru á luftini, so mugu vit koyra á.

## Annika Andreasen,

### stjóri á Synergi



Eg vildi ynskt at eg kundi sagt Synergi, men tað verður ivaleyst longri frammi í tíðini. Hesaferð er eitt gott boð Formula.fo, tí tey hava eitt sera gott úrslit og ikki minst tí at tey hugsa globalt og leggja seg eftir at menna skipanir sum eru kappingarførar í útlondunum. Tað er júst har, ið tann verðurligi vakstarmøguleikin liggur.

## Jóhanna á Bergi,

### stjóri í Faroe Ship



Bakkafrost – Eg haldi at teir hava gjørt tað ótrúliga gott í ár, so teir eru uttan iva eitt boð.

Tað má vera at arbeiða seriøst við tí man arbeiðir við, fokusera uppá kjarnuøkini. Arbeiða professionelt og ikki missa mótið.

## Eirikur á Húsamørk,

### stjóri á Faroe Marine Products



Bakkafrost, fiskavirkið í Gøtu og Tavan eru trý virkir, ið hava góð úrslit og arbeitt miðvíst. Tey eru øll góð boð uppá ársins virkið 2008. Tað eru ivaleyst onnur eisini, men hetta er nærkomi og vinnan sum eg kenni til og havi lættast at fyrihalda meg til, eisini havi eg gloymt koduna til business-line, so tað er trupult at úttala meg um onnur virkir, við so stuttum skotbrái.

## Hákun Steingrímsson,

### stjóri í Formula.fo



So má eg jú siga Formula.fo. Vit hava gjørt skilagóðar íløgur, og hava vent eyguni úteftir og roynt at víðka um marknaðin til egin produktir.

At víðka um marknaðin úteftir í heim eisini. Vit eru alt ov bundin av okkara egna lítla marknaði, og um vit skulu standa sterkari, mugu vit víðka um marknaðin úteftir eisini.


BlackBerry Curve 8310

Vinnutólið, tú altíð hevur saknað

Við BlackBerry frá Vodafone hevur tú samband við fólk, sama hvar tú ert. Við teldupostí, telefon, kalendara, myndatóli, videoupptakara, interneti, streaming og GPS er einki mark fyri, hvat tú kanst fáa frá hondini.

Les meira um BlackBerry hald á vodafone.fo.
Vit eru eisini til tænastu á 20 20 20.

kr. 3995



Løtan er tín

vodafone

Sony Ericsson K530i

Septembertilboð

Fartelefon við Bluetooth, MP3-spælara, FM-útvarpi, 2 MP myndatóli, TrackID music recognition, vapp og myndaboðum. Tekur M2 minniskort.

Fæst á vodafone.fo og í vodafone-handlunum.

kr. 1495



Løtan er tín

vodafone